# Avgerandi í botninum

**Ein av avgerandi dystunum í botnstríðnum í bestu kvinnudeildini verður leiktur sunnudagin, tá Sóljan vitjar á Skála**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*



*Hóast tær ikki hava vunnið, síðani tær vitjaðu Kyndil í grundspælinum, so hevur fleiri ferðir verið sera nær við hjá StÍF. Sunnudagin fáa tær vitjan av Sóljuni, og hetta er ein dystur, sum hvørgin parturin hevur ráð at tapa*

Hóast nógv hóvasták er gjørt burtur úr, at dysturin millum Sóljuna og StÍF frá grundspælinum enn ikki er spældur, so merkir hetta tó ikki, at liðini ikki vilja spæla móti hvørjum øðrum.

Sunnudagin vitjar Sóljan á Skála, og nógv bendir á, at hetta kann gerast ein av avgerandi dystunum í stríðnum um at sleppa undan niðurflytingini.

Undan dystinum er støðan tann, at Sóljan hevur eitt stig meira enn StÍF, men hetta er sjálvandi ikki nøkur vissa fyri, at støðan fer at verða hin sama, tá kappingarárið er runnið.

Verður hugt at dystunum, sum liðini bæði hava leikt í seinastuni, so er skjótt at staðfesta, at úrslitini hjá StÍF hava verið eina tonn betri enn tey hjá Sóljuni. Tepur tap hava verið fyri bæði Stjørnuni og VB, og havandi hetta í huga, so áttu strandakvinnurnar at verið betri fyri í løtuni. Hinvegin prógvaði Sóljan fleiri ferðir í fjør, at meðan tær ikki standa seg so væl móti sterkaru liðunum í deildini, so eru tær væl førar fyri at finna rætta spælið fram til røttu tíðina, og so er spurningurin, hvørt hetta eisini fer at vera galdandi sunnudagin.

## Greiðir favorittar

Tveir aðrir dystir verða í kvinnudeildini um vikuskiftið, og í báðum er talan um greiðar favorittar á pappírinum.

VÍF vann mikukvøldið fyrru hálvfinaluna móti Neistanum, og tað er illa hugsandi, at tær ikki eisini vinna dystin sunnudagin. Ikki minst tá VÍF mikukvøldið framhaldandi tóktist hava dystirnar ímóti hollendska Hellas malandi í heysinum. Nú eru aftur fýra dagar farnir aftur um bak, og megnar VÍF at savna tankarnar um uppgávurnar í heimligu kappingini, so er einki at ivast í, at tvey stig afturat koma inn á stigakontina.

Í Vági verður dystur millum VB og Kyndil, og her líkist VB einum greiðum favoritti. Eisini hóast Kyndil ímóti júst VB fekk nakað, sum líktist einum veruligum upptúri stutt undan jólum. Upptúrurin var tó lítil, og síðani tykjast kyndilskvinnurnar at vera falnar í nær sagt vanligu grøvini, har liðið sýnir nógv minni enn tað, sum tær eru førar fyri.

VB hevur tó heldur ikki havt so gott glið á í seinastuni, men á heimavølli eru tær altíð drúgvar, og enn hava tær møguleikan fyri bronsuni at stríðast fyri.

# Brakið verður á Hálsi

**Grundað á seinastu dystirnar, er lítið at ivast í, at Neistin er favorittur ímóti VÍF sunnudagin, men vestmenningar hava áður prógvað, at teir kunnu reisa seg, tá mest stendur á**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*



*Neistin hevur valla ráð at tapa dystin sunnudagin. Gera teir tað, eru vestmenningar trý stig á odda, og tá kunnu teir bláu ikki avgera nakað sum helst sjálvir*

Absolutti toppdysturin hetta vikuskiftið er uttan iva tann í Havn millum Neistan og VÍF. Ein dystur, sum lættliga kann gerast avgerandi fyri, hvønn veg meistaraheitið fer, og sum í øllum førum fer at geva eina ábending um, hvussu liðini eru fyri, nú vit so spakuliga nærkast endaspurtinum í hondbóltskappingini.

## Mugu standa saman

VÍF tapti fyri fyrstu ferð hetta kappingarárið, tá teir mikukvøldið vitjaðu á Skála, men hóast hetta var fyrstu ferð, so kann neyvan sigast, at tapið kom sum nakað sjokk fyri vestmenningar.

Verður sæð burtur frá dystinum móti Neistanum fyri hálvari aðru viku síðani, so er langt síðani, at VÍF hevur sýnt eitt sannførandi avrik. Móti kollfirðingum prísaðu teir sær lukkuliga fyri, at tað eydnaðist at toga sigurin í land, og beint fyri jól fingu teir bert eitt stig úr dystinum móti H71.

Hetta kundi bent á, at liðið hevur stórar trupulleikar at dragast við, og hesir gerast neyvan minni av, at hvørki Sámal Joensen ella Eli Müller, tykjast vera tøkir í løtuni. Ein lítil møguleiki er tó fyri, at Sámal kann vera við sunnudagin, men spurningurin er, um vestmenningar vilja vága eyma ryggin í einum dysti, soleiðis at skaðasteðgurin gerst longri enn neyðugt.

Sigurin móti Neistanum prógvaði tó sum sagt, at liðið kann reisa seg, og kanska verður sálarliga ávirkanin av hesum dystinum júst tað, sum kann bjarga VÍF. Teir vita við sær sjálvum, at teir eru førir fyri at standa saman, tá nógv stendur á, og neyvan hevur hetta verið so neyðugt hjá teimum í langa tíð, sum tað verður sunnudagin.

## Verjan er lykilin

Neistin líkist hinvegin einari væl smurdari maskinu í løtuni.

Á álopssíðuni er liðið mest sum flúgvandi í hvørjum dysti, og eru teir ikki tað, so hevur liðið kortini somikið sterkar einstaklingar, at hesir mest sum einsamallir kunnu avgera ein dyst. John Petersen, Hans Áki Dal-Christiansen, Jacob Jónsson og Heini Joensen, eru allir leikarar, sum á einum góðum degi fara upp um tey 10 málini, og so kann gerast meira enn tungt hjá mótstøðuliðunum.

Móti VÍF í Vestmanna var trupulleikin tó, at ringu dagarnir vóru ov nógvir í tali, og hetta kundi bent á, at liðið er eins væl fyri sálarliga, sum vestmenningar eru tað. Hinvegin kann hetta eisini viðføra, at viljin til at vinna verður enn sterkari hesaferð, og hendir tað, er lítið at ivast í, at Neistin er greiður favorittur.

Størsti trupulleikin hjá liðnum hevur leingi verið verjuparturin, men spurningurin er, hvørt hesin kortini er um at verða loystur. Fleiri av seinastu dystunum hevur liðið roynt seg við 3-2-1 verju, og møguliga er hendan nú somikið væl innspæld, at hon verður avgerandi luturin.

Undir øllum umstøðum, so hevur Neistin valla ráð at tapa dystin sunnudagin. Gera teir tað, so er VÍF trý stig á odda, og so kann Neistin bara vóna, at vestmenningar annars halda á fram við tungu gongdini, soleiðis at stig verða mist á vegnum, meðan havnarliðið samstundis skal vinna alt sítt, og tað kann gerast ein tung og drúgv bíðitíð.

## Tvær lokaluppgerðir

Annars verða dystir afturat leiktir um vikuskiftið, og er í báðum førum talan um lokaluppgerðir.

Í Havn hittast H71 og Kyndil leygardagin, og hóast hoyvíkingar á pappírinum eru sterkari, so er spenningurin um dystin stórur.

Júst móti H71 vann Kyndil ein hampuliga óvæntaðan sigur í grundspælinum, og tað er so avgjørt einki, sum bendir á, at liðið er vorðið veikari, nú farið verður undir grundspælið. Tvørtur ímóti hevur spælið verið heilt gott til tíðir, men spurningurin tykist vera, um teir raka rætta dagin móti hovvíkingum, sum við Bjarna, Halgir og Finni hava einstaklingarnir, sum lættliga kunnu søkka alla vón hjá Kyndli um stig leygardagin.

Seinsti dysturin verður á Skála, har StÍF tekur ímóti Tjaldri, og eins og við hinari lokaluppgerðini, so tykist hesin dysturin at vera víðopin.

StÍF hevur annars við sigrinum á VÍF alla grund til at bera høvdið høgt, eins og sjálvsálitið skuldi verið í topp. Tískil kunnu teir lættliga fatast sum sjálvsagdir favorittar.

Við StÍF tykist tó einki at vera sjálvsagt. Avrikini hava svingað millum tað eminenta og tað heilt vánaliga, og so er spurningurin, hvussu lagið verður hesaferð.

Heldur ikki hjá Tjaldrinum hevur stórvegis skil verið á, hvussu avrikini hava verið. Til tíðir hevur mest sum alt borið til, meðan støðan aðrar tíðir er júst hin øvugta, so alt í alt tykist dysturin á Skála vera púrasta opin.



Fram-Fleyr 1-3 (21-25, 25-21, 24-26, 21-25)

# Fleyr setti Fram til viks

**Flogbóltur: So hevur Fleyr aftur fingið vind í seglini. Hóskvøldið gekk tað út yvir Fram, sum tapti fyri triðju ferð á rað**

*Emil Lisberg Jacobsen*

Yvirskriftin skal ikki takast heilt bókstaviligt, tí enn hava teir í Fram tíð og kunnu avgera tað sjálvir, men fyribils eru teir settir til viks í oddastríðnum, eftir at Fleyr hóskvøldið sigraði 3-1 í Eysturskúlanum. Og í øllum førum má sigast, at dysturin móti ÍF á Kambsdali í morgin fær ómetaliga stóran týdning fyri víðari gongdina hjá Fram í kappingini.

Fyri Fleyr kom úrslitið sera væl við, tí við uppiborna sigrinum er munurin millum teir og SÍ er so at siga eingin.

Sjálvur dysturin var ikki so øgiliga nógv at rópa hurrá fyri. Fyri Fleyr stóð hann ikki mát við dramatiska sigurin móti SÍ fyri eini viku síðani - sjálvt um úrslitið var eins gott - og teir í Fram høvdu heldur ikki so nógv at fegnast um, og bara í løtum var spælið gott hampuliga leingi ísenn.

Hartil er at siga, at høllin í Eysturskúlanum sum heild ikki leggur upp til alt ov gott spæl, tí har er tronligt.

## Trý sett sama úrslit

Tvey tey fyrstu settini endaðu 25-21, men til hvør sítt lið. Fleyr vann tað fyrsta, har bæði liðini høvdu sínar løtur og vóru frammanfyri. Tað næsta settið vann so Fram, og tað gjørdu teir tryggari enn tølini vísa.

Í triðja setti var tað so aftur Fleyr, sum hevði yvirvág, og teir førdu so at siga allan vegin. At tað endaði 26-24 vísir, at endin bleiv eitt sindur spennandi, men tað var ikki fyrr enn móti endanum av settinum, at tað bleiv veruliga javnt millum liðini.

Fjórða sett bleiv tað síðsta í dystinum. Fleyr hevði enn einaferð Jan Hentze millum teir bestu bæði í álopi og í verju, og teir vunnu settið við somu tølum sum tað fyrsta - 25-21.

Við sigrinum kom Fleyr upp á níggju stig fyri 11 dystir, og tað er bert eitt færri enn SÍ. Fram verður standandi á seks stigum, men teir hava leikt ein dyst færri enn bæði SÍ og Fleyr.

# Oddasessirnir kunnu skifta hendur

**Flogbóltur: Báðir kvinnudystirnir hetta vikuskiftið hava greiðar favorittar, meðan tað er eitt sindur meira ivasamt hjá monnunum. Báðar deildirnar kunnu hava eitt nýtt oddalið, tá dystirnir í dag og í morgin eru leiktir**

*Emil Lisberg Jacobsen*

Tveir kvinnudystir og tveir mansdystir verða leiktir í meistaradeildunum hetta vikuskiftið, og bæði hjá kvinnum og monnum kann oddasessurin skifta eigara.

Fyri at taka kvinnudystirnar fyrst, so er tað kortini ikki so øgiliga sannlíkt, at TB missir fremsta plássið, sum tær hava átt alla kappingina. TB skal møta ÍF á Kambsdali, og verður hetta fyrsti landskappingardystur hjá TB-kvinnunum í 2002. Í Mjølnir-kappingini var avrikið ikki meir enn næstbest, men tað verður óvæntað, um ÍF megnar at koppa teimum í dag. Tað hevur snøgt sagt gingið av skriðuni hjá ÍF í seinastuni, og sjálvt um tær vunnu móti Fleyr síðsta sunnudag, var tað fyrsti sigurin í langa tíð. TB verður ein heilt øðrvísi mótstøða.

Er TB favorittur á Kambsdali í dag, so er Mjølnir enn størri favorittur í morgin, tá tær fáa Fleyr á vitjan. Mjølnirkvinnurnar hava nú aftur fingið gullið í eygsjón, og nógv halda, at nú steðga tær ikki aftur. Hvussu er og ikki, so er lítið sum bendir á, at tað verður Fleyr, sum leggur fót fyri klaksvíkskvinnurnar. Tað líkist framvegis eini innanhýsis avgerð millum Mjølnir og TB, og bæði liðini vita, at stig mist móti nøkrum av hinum liðunum kunnu gerast sera kostnaðarmikil.

## Trýstið liggur á Fram

Hjá monnunum kann oddasessurin eisini skifta hendur. Tað ger hann, um Fleyr vinnur í Klaksvík í morgin. Eftir tveir ósigrar móti ÍF fekk Fleyr tveir sigrar innan fimm dagar móti hinum báðum oddaliðunum SÍ og Fram, og við einum sigri móti Mjølni fara teir uppum SÍ - sum ikki spælir hetta vikuskiftið - á stigatalvuni. Hjá Mjølni hevur tað ikki gingist nakað serligt, og nú ÍF hevur fingið fótin fyri seg aftur, er klaksvíksliðið niðast í deildini. Av tí sama er Fleyr sjálvsagdur favorittur í morgin, men sum úrslitini í bestu mansdeildini higartil hava lagað seg, veitst tú aldrin...

Tað sama kann sigast um hin mansdystin, sum er á Kambsdali millum ÍF og Fram. Fyri Fram er tað altavgerandi at vinna og minka gloppið upp til oddasessin. Støðan hjá Fram eftir tapið móti Fleyr hóskvøldið versnaði munandi, og teir hava illa ráð til at missa fleiri stig, serliga ikki móti liðum, sum eru niðanfyri teir á stigatalvuni.

Fuglfirðingar kunnu hinvegin fara á vøllin við góðari samvitsku, tí hjá teimum hevur tað gingið væl í seinastuni. Og teir vita eisini, at trýstið í morgin ikki liggur á teimum, men á Fram. Tað er eingin sum roknar við ÍF sum føroyameistara, og tí kunnu teir bara taka tað sum tað kemur.

**KVINNUR**

| | |
|---|---|
| 19.01. | ÍF-TB |
| 20.01. | Mjølnir-Fleyr |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| TB | 9 | 8-1 | 25-7 | 9 |
| Mjølnir | 10 | 7-3 | 24-15 | 9 |
| Dráttur | 11 | 5-6 | 21-22 | 6 |
| ÍF | 10 | 3-7 | 17-25 | 3 |
| Fleyr | 10 | 2-8 | 9-27 | 3 |

**MENN**

| | |
|---|---|
| 20.01. | ÍF-Fram |
| 20.01. | Mjølnir-Fleyr |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| SÍ | 11 | 8-3 | 28-14 | 10 |
| Fleyr | 11 | 7-4 | 26-21 | 9 |
| Fram | 10 | 6-4 | 23-19 | 6 |
| ÍF | 10 | 2-8 | 12-27 | 4 |
| Mjølnir | 10 | 3-7 | 16-24 | 3 |

# Fyrsti finalisturin skal finnast

**Leygardagin skal VB royna at vinna inn aftur tey fýra málini, sum Stjørnan vann fyrru hálvfinaluna við**

COCA-COLA KAPPINGIN – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Tað var ikki sørt, at kvinnurnar hjá VB iðraðu seg, tá tær fyri viku síðani vóru í Klaksvík, har fyrra hálvfinalan móti Stjørnuni var á skránni.

Bert fimm minuttir fyri leiklok stóð tá á jøvnum millum liðini, men seinastu minuttirnar skeyt heimaliðið fimm mál fleiri enn VB, og vunnu tær sær tí ein kanska avgerandi fyrimun í finalustríðnum.

Tað eru hesi fýra málini, sum VB nú skal royna at vinna innaftur, og hóast møtumikið, so er tó einki at ivast í, at hetta er gjørligt hjá VB. Tvey tey seinastu kappingarárini hava tær úr Vági verið í partur av steypafinaluni, og báðu ferðirnar eydnaðist teimum í hálvfinaluni at basa liðum, sum í landskappingini vóru stødd ovarligari á stigatalvuni.

Hinvegin hevur Stjørnan tey bæði seinastu árini tapt hálvfinalur sínar móti liðum, sum á pappírinum hava verið veikari. Í fjør fyri júst VB, og árið fyri vóru tað tá komandi steypavinnararnir úr Kyndli, sum bremsaðu annars einaráðandi klaksvíkingunum.

Hagtølini tala soleiðis fyri VB, men tað er fyrst og fremst á vøllinum, at dysturin skal avgerast, og hóast tað sálarliga er ein góð barlast við hagtølunum, so vinna hesi í sjálvum sær ongan dyst.

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 381 | 232 | 149 | 14 |
| 2 | Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 380 | 293 | 87 | 13 |
| 3 | Neistin | 2 | 1 - 1 - 0 | 305 | 261 | 44 | 11 |
| 4 | VB | 2 | 1 - 1 - 0 | 323 | 335 | -12 | 9 |
| 5 | Kyndil | 2 | 0 - 0 - 2 | 311 | 365 | -54 | 3 |
| 6 | Sóljan | 2 | 0 - 0 - 2 | 250 | 385 | -135 | 2 |
| 7 | StÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 223 | 302 | -79 | 1 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 408 | 339 | 69 | 15 |
| 2 | Neistin | 2 | 2 - 0 - 0 | 442 | 363 | 79 | 14 |
| 3 | StÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 363 | 346 | 17 | 8 |
| 4 | H71 | 2 | 0 - 0 - 2 | 384 | 409 | -25 | 6 |
| 5 | Tjaldur | 2 | 1 - 0 - 1 | 342 | 384 | -42 | 6 |
| 6 | KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 393 | 438 | -45 | 4 |
| 7 | Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 320 | 373 | -53 | 4 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 9 | 8 - 1 | 25 | 7 | 18 | 9 |
| 2 | Mjølnir | 10 | 7 - 3 | 24 | 15 | 9 | 9 |
| 3 | Dráttur | 11 | 5 - 6 | 21 | 22 | -1 | 6 |
| 4 | ÍF | 10 | 3 - 7 | 17 | 24 | -7 | 3 |
| 5 | Fleyr | 10 | 2 - 8 | 8 | 27 | -19 | 3 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 11 | 8 - 3 | 28 | 14 | 14 | 10 |
| 2 | Fleyr | 10 | 6 - 4 | 23 | 20 | 3 | 7 |
| 3 | Fram | 9 | 6 - 3 | 22 | 16 | 6 | 6 |
| 4 | ÍF | 10 | 2 - 8 | 12 | 27 | -15 | 4 |
| 5 | Mjølnir | 10 | 3 - 7 | 16 | 24 | -8 | 3 |

## Dystir hetta vikuskiftið

1. deild kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 20.01 | 14.30 | Neistin | - | VÍF |
| 20.01 | 14.30 | StÍF | - | Sóljan |
| 20.01 | 13.30 | VB | - | Kyndil |

1. deild menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 19.01 | 16.00 | H 71 | - | Kyndil |
| 20.01 | 16.00 | Neistin | - | VÍF |
| 20.01 | 16.00 | StÍF | - | Tjaldur |

Coca-Cola kappingin kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 19.01 | 17.00 | VB | - | Stjørnan |

Flogbóltur
Meistaradeild kvinnur

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 19.01 | 13.00 | ÍF | - | TB |
| 20.01 | 13.00 | Mjølnir | - | Fleyr |

Meistaradeild menn

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 20.01 | 15.00 | ÍF | - | Fram |
| 20.01 | 15.00 | Mjølnir | - | Fleyr |